

# Sjeyndu ferð at Statoil finnur gass í Tansania

Jógvan Hugo Gardar

14.10.2014 - 12:51

Oljan.fo

Statoil og samstarvsfelagið ExxonMobil kunngjørdu í morgun at tey hava funnið gass í einum leitibrunni uttafyri Tansania-strondini. Brunnurin kallast Giligiliani-1.

Leitistjórin hjá Statoil í Tansania, Nick Maden, er væl nøgdur, og sigur í eini viðmerking at hetta fundið er áhugavert og vísir at gass er at finna í einum víðari øki enn tað tey vistu frammanundan.

Boripallurin Discoverer Americas skal nú halda fram at bora í sokalla Kungamanga-ætlanini, ið liggur miðskeiðis í blokki 2. Hetta er eitt øki sum hevur víst seg at vera sera +ahugavert fyri Statoil.

Giligiliani-1-fundið er tað sjeynda sum Statoil og ExxonMobil hava funnið í blokki 2. Frammanundan er gass funnið í Zafarani-1, Lavani-1, Tangawizi-1, Mronge-1 og Piri-1 og Lavani-2.

Statoil hevur høvuðsábyrgdina av leitingini í loyvunum í blokki 2, og eigur 65 prosent av loyvinum, meðan ExxonMobil eigur 35 prosent. Statoil hevur verið í Tansania síðani 2007.